Oyrarbakki fekk egið postnummar

Frá 1. apríl hevur Oyrarbakki postnummarið 400

POSTUR
Eirikur Lindenskov

Postverk Føroya gekk ynskinum hjá fólki á Oyrarbakka á møti í kravinum um egið postnummar.

Fólk á Oyrarbakka hava savnað undirskriftir við umbøn um at fáa egið postnummar, tí tað darvar illa, at bygdin hevur sama postnummar sum grannabygdin, Oyri.

Frá sunnudegnum 1. apríl at rokna kunnu fólk skriva »400 Oyrarbakki« á postin til fólk á Oyrarbakka.

Mortan Rasmussen á Postverki Føroya sigur, at hóast fólk ikki minnast at rætta postnummarið við tað sama, so verður posturin borin út kortini, tí posturin til Oyrar og Oyrarbakka verður borin út frá sama posthúsi.

Posthúsið á Oyrarbakka er útberingarposthús fyri 420 Hósvík, 430 Hvalvík, 435 Streymnes, 436 Saksun, 437 Nesvík, 438 Langasand, 440 Haldars-vík, 445 Tjørnuvík, 450 Oyri, 460 Norðskála, 465 Svínáir, 466 Ljósá, 475 Funning, 476 Gjógv, 477 Funningsfjørð og 478 Elduvík.

Vunnu virðisløn í Noreg

Unga virki, Leia, vann virðisløn fyri umhvørvisvinarlig astu vøruna á sølustevnu í Stavanger. Í dag er árskappingin Ungt Virki á handilsskúlanum á Kambsdali

UNGT VIRKI
Eirikur Lindenskov

Í sambandi við kappingina Ungt Virki var herfyri sølustevna í SMS í Havn. Hendan kapping gav sum vinning ískoyti at fara til stevnuna Young Enterprise International Trade Fair, sum júst hevur verið í Stavanger.

Unga virkið »Leia« vann og fór til Stavanger, har tey vunnu eina virðisløn fyri ta mest umhvørvisvinarligu vøruna.

113 virki tóku lut á sølustevnuni í Stavanger, og 20.000 fólk vitjaðu stevnuna.

Í dag er so árskappingin millum tey fýra ungu virkini á Føroya Handilsskúla á Kambsdali. Vinnarin tekur lut í Danmarksmeistarakappingini í Keypmannahavn 20. og 21. apríl.

Vinningurin, sum Føroya Handilsskúli gevur, fevnir um ferðaútreiðslur fyri eitt virki og ein lærara aftur og fram til DM.

Vinnarin í Keypmannahavn kann fara til Moskva 8. - 12. august til Young Enterprise International Competition.

Aftur í ár hava fyrireikararnir fingið Nis Kaper Buch, sum er stjóri í Finansrádet, til høvuðsdómara. Hinir dómararnir eru Rógvi Róin frá SMS, Ólavur Jensen úr Føroya Sparikassa og Marita Rasmussen úr Vinnuhúsinum. Lærarar eru Maria Gregersen á Kambsdali og Martha Weihe Dalsgaard úr Havn. Virkini eru ÁBBA (fløga), HAMMB (gongutúrar), Leia (Ullteppi) og UNG-T (T-shirts við kult-tekningum).

Als onga ætlan at blanda seg uppí

Ætlanin við teimum báðum stovnunum, Útvarpi og Sjónvarpi Føroya, hevur frá fyrstu tíð verið, at teir skuldu virka sum »public-service«-stovnar, sigur Torbjørn Jacobsen m.a. í svari til fyrispurning

SVARAÐUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Sámal Petur í Grund, táverandi løgtingsmaður, setti mentamálaráðharranum fyrispurning herfyri eftir ein fund í Uttanlandsnevndini, tá ið spurningurin tók seg upp, hvør ið hevði sagt hvat um, hvussu ið farast skuldi fram frá føroyskari síðu í málinum um møguligar, komandi, hernaðarútbyggingar hjá NATO her á landi.

Men mentamálaráðharrin, Torbjørn Jacobsen, sigur seg ikki hava nakra almenna meining um hetta málið, heldur ikki um hvar ið rætturin ella órætturin liggur um okkurt er áfatt, men hinvegin man handfaringin av málinum í hesum almenna miðili hava fallið onkrum í politisku skipanini somikið fyri bróstið, at hildið varð neyðugt at spyrja landsstýrismannin í mentamálum, ið varðar politiskt av almennu fjølmiðlunum, nakrar ítøkiligar spurningar, sigur Torbjørn Jacobsen.

Blandar seg ikki

Sámal Petur í Grund vildi hava at vita, um ongar reglur eru fyri, nær ein politikari kann koma at skermi og mikrofon í SVF, og um allir politikarar eru líkastilláðir yvir fyri SVF?

Mentamálaráðharrin sipar m.a. í svarinum til øll tey ymisku uppskotini viðvíkjandi fjølmiðlum, fjølmiðlaetikki og kringvarpi, og eisini verður sipað til svar frá útvarps- og sjónvarpsstjóranum.

Og mentamálaráðharrin metir annars at fyrispurningurin heilt greitt liggur inni í programpolitiska feltinum hjá stovninum, og Torbjørn Jacobsen vónar at hava svarað fyrispurningínum so frætt, sum tað nú einaferð letur seg gera, tá ið hann heilt greitt liggur inni í einum felti, sum landsstýrismaðurin í mentamál um fyri tað fyrsta ikki kann blanda seg uppí, og fyri tað annað als onga ætlan hevur um at blanda seg uppí.

Bjarni Djurholm skal ikki sleppa at siga ósatt

– Tað er beinleiðis ósatt, tá ið Bjarni Djurholm upplýsir fyri Føroya Løgtingi, at sakkunnleikin hevur fleiri tilmæli um, hvussu tað nýggja suðuroyarskipið skal síggja út, sigur Heri Hjelm, sum sjálvur sat í verkætlanarbólkinum

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
Áki Bertholdsen

– Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, leggur misvísandi upplýsingar fyri Løgtingið, sigur Heri Hjelm, sum sat í verkætlanarbólkinum, sum hevur fyrireikað tað nýggja suðuroyarskipið

– Tað, sum Bjarni Djurholm upplýsti fyri Føroya Løgtingi mikudagin um tað nýggja suðuroyarskipið, er beinleiðis ósatt.

Heri Hjelm í Vági, sum sjálvur sat í nevndini, ið hevur fyrireikað byggingina av nýggjum suðuroyarskipi, vísir uppá tað harðasta tí aftur, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, greiddi tinginum frá mikudagin um tað nýggja Suðuroyarskipið.

Tað, hann sipar til, er, at Bjarni Djurholm greiddi tinginum frá, at sakkunnleikin hevði mælt til og hevur víst á fimm ymisk uppskot um skip til suðuroyarsiglingina. Hann segði, at tey uppskotini, sum lógu á borðinum, eru øll útarbeidd av Strandferðsluni og projekteringsfelagnum Knud E. Hansen.

Landsstýrismaðurin segði eisini, at tað var skeivt, tá ið tað áður er fært fram, at tað eina skipið er longu projekterað.

– Tað rætt, at tað er gjørd ein skitsa av tí eina skipunum. Men tá ið hini uppskotini vórðu løgd fram, varð avrátt, at tað var ikki neyðugt at gera skitsur av teimum skipunum. Men tað er skeivt at siga, at tað eina skipið er komið longri enn hitt.

Beinleiðis ósatt

– Hetta er beinleiðis ósatt, og tað skal Bjarni Djurholm ikki sleppa at føra fram fyri Føroya Løgtingi.

Tað sigur Heri Hjelm í Vági. Heri Hjelm sat sjálvur í teirri serkønu verkætlanarnevndini, sum hevur lagt tað nýggja suðuroyarskipið til rættis.

– Sakkkunnleikin hevur ikki fimm tilmæli um skip til suðuroyarsiglingina. Sakkunnleikin hevur bara eitt tilmæli, sum verður mett at vera tann besta loysnin. Tað er eitt skip, sum siglur 21 míl.

– At landsstýrismaðurin so sjálvur hevur biðið um at fáa onnur uppskot, hevur onki við arbeiðið hjá verkætlanarnevndini at gera.

Heri Hjelm sigur, at tað er eisini ósatt, tá ið Bjarni Djurholm sigur, fyri Løgtinginum, at onki av uppskotunum eru komin longri í fyrireiking og projektering enn nakað annað.

– Tað eina uppskotið, sum verkætlanarnevndin hevur lagt fram, er er projekterað rættiliga langt, men øll hini uppskotini eru bara leyðslig roknistykkir um byggikostnað og rakstrarútreiðslur.

Fekk bara eitt uppskot

Eisini Jógvan Krosslá í Vági, ið somuleiðis sat í verkætlanarbólkinum, sigur, at bólkurin læt bara eitt uppskot úr hondini, tí hann metti, at hetta var tann frægasta loysnin fyri Suðuroynna.

Í Verkætlanarbólkinum sótu umboð fyri Strandferðsluna, manningina á Smyrli, umframt fyri vinnulívið og kommunurnar í Suðuroynni, tvs, umboð fyri tey, sum skuldu brúka skipið.

– Eftir at hava viðgjørt rættiliga væl og leingi, hvørji krøv tað nýggja suðuroyarskipið skuldi lúka, komu vit til eina niðurstøðu. Niðurstøðan var, at skipið skuldi hava hálvanannan tíma úr Suðuroy til Havnar og at tað skuldi vera eitt havgangandi skip. Tvs, at fyri at tað skuldi vera so sjógott sum gjørligt, skuldi tað ikki ikki hava portur framman. Eitt nú helt manningin á Smyrli, at tað var umráðandi, at skipið ikki hevði portur framman, tí portrið ger, at skipið verður kubbutari og verri enn so so sjógott sum hitt. Í hesum sambandi var tað eisini Estonia-vanlukkan sum spøkti.

– Hini uppskotini hevur landsstýrismaðurin sjálvur biðið um, men tað hevur verkætlanarnevndin onki við at gera.

Jógvan Krosslá vísur eisini á, at tað er komið rættiliga langt at projektera tað skipið, sum verkætlanarbólkurin hevur skotið upp, men at hini skipini púra ongan veg eru komin

Ongin ósemja í landsstýrinum um tað nýggja suðuroyarskipið

– Tað nýggja suðuroyarskipið er avgjørt ikki nakað stríðsmál í samgonguni. Viðgerðin er ógvuliga saklig. Vit eru bara ikki komin til eina niðurstøðu enn, sigur Bjarni Djurholm

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
Áki Bertholdsen

– Tað er avgjørt ikki nøkur ósemja í landsstýrinum um tað nýggja suðuroyarskipið.

Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Hann hevur higartil ikki viljað sagt nakað um málið, fyrrenn tað er avgjørt í landsstýrinum. Men hann heldur, at sumt av tí, sum er fært fram, er so misvísandi, at hann má tala at.

–Vinnumálastýrið hevur fingið tilfar um fleiri skip. Útfrá tí tilfari, vit hava fingið, hava vit gjørt eitt notat og eitt tilmælið og lagt alt tilfarið fyri Landsstýrið.

Bjarni Djurholm leggur dent á, at øll skipini, sum tilfar er fingið til vega um, lúka tey krøv, sum vórðu sett til eitt nýtt suðuroyarskip.

Hann váttar tó at verkætlanarbólkurin hevur skotið upp at skipið skal sigla 21 míl.

– Tað hevur eisini verið útgangsstøðið hjá projekteringsfelagnum, Knud E. Hansen, tá ið tað fyrsta uppskotið varð latið úr hondum .

– Síðani havi eg boðað frá, at tað eg vildi hava fleiri skip at velja ímillum og tí eru onnur uppskot eisini komin á borðið, har somu upplýsingar eru fyri øll uppskotini, sum fyri tað fyrsta uppskotið.

– Men kravið frá mær var, at øll uppskotini skuldu í minsta lagi lúka tey krøv, sum Strandferðslan setti til skipið.

– Burturúr øllum teimum uppskotinum, havi eg so lagt eitt tilmæli fyri Landsstýrið.

Bjarni Djurholm sigur, at hansara tilmæli er at byggja eitt skip, sum siglur 19 míl. Tað eru 2,5 míl skjótari enn Smyril, sum nú er, tí hann siglur 16,5 míl.

– Men eg havi eisini mælt til, at Landsstýrið viðgerð øll uppskotini.

Bjarni Djurholm sigur, at ongin ivi er um, at hann vil hava, at suðuroyingar skulu fáa tað bestu loysnina.

– Tey, sum hava sitið í verkætlanarbólkinum siga, at sakkunnleikin hevur víst á tað bestu loysnina og hava mælt til at byggja tað skipið. Hví verður so tosað um onnur uppskot eisini?

– Nú veit eg ikki, hvør sakkunnleikin er. Eg meti, at projekteringsfelagið Knud E. Hansen er sakkunnleikin og ikki nakar annar. Og Knud E. Hansen hevur víst mær á fleiri ymsar loysnir. Eg veit onki um, at verkætlanarbólkurin hevur sitið saman við Knud E. Hansen og lagt skipið til rættis. Bólkurin hevur víst á eitt skip, sum tey halda er tann frægasta loysnin fyri Suðuroynna. Men hví so ikki byggja eitt skip, sum sigur 22 míl? Tað hevði verið uppaftur betri og lutfalsliga hevði tað ikki verið so nógv dýrari. Tað einasta, eg havi biðið um, er at fáa nøkur skip at samanbera við. Spurningurin er um skipið, sum verkætlanarbólkurin vísir, er tað einasta rætta skipið.

– Nú, vit skulu byggja nýtt suðuroyarskip, haldi eg, at tað er rætt at hava fleiri skip at velja ímillum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum

Limir í verkætlanarbólkinum siga annars, at munurin á teimum báðum skipunum, sum sigla 21 míl og 19 míl, er ikki bara farturin?

– Nei, skipið, sum siglur seinni er styttri og smalri, men tað lýkur framvegis krøvini, sum sett vórðu. Skulu vit tosa um hitt, so hevði tað helst verið uppaftur betri við einum skipi, sum siglur 22 míl.

Byggjast í Evropa

Landsstýrismaðurin í vinnumálum sigur, at umsitingin hevur mælt til, at skipið verður bygt í Evropa. Tó kunnu øll skipinibyggjast bíligari í Kina, men so mugu vit tryggja okkum, at dygdin er ílagi.

Bjarni Djurholm sigur, at sama hvat skip verður bygt, verður tað neyðugt við nýggjari samferðsluhavn í Suðuroy.

– Har eru tvær loysnir. Onnur er at byggja Drelnes út fyri 50 milliónir. Hin loysnin er at byggja út eystanfyri Drelnes fyri 75 milliónir. Hetta seinna er helst frægasta loysnin, tí so verður havnin á Drelnesi leys til onnur endamál, eitt nú oljuendamál. Harafturat er eisini ynski sett fram um at nýggja suðuroyarskipið skal kunna leggja at í Vági, og tað kostar um 20 milliónir.

Bjarni Djurholm sigur, at hann vil hava alt málið avgreitt í einum, tí fyri at skipið skal kunna liggja trygt, er tað neyðugt at framskunda samferðsluhavnina í Suðuroy

Hví skulu hesi bæði málini tengjast saman tá ið samferðsluhavn í Suðuroy frammanundan stendur á langtíðar fíggjarætlanini?

– Tað verður ikki mett at vera skilagott at bíða við havnarlagnum til aftaná at skipið er bygt. havnarlagið skal helst verða klárt, tá ið skipið er klárt. Tí skulu hesi bæði málini helst loysast saman.

Hann leggur einaferð dent á, at tað er ongin ósemja í landsstýrinum um málið.

– Vit hava havt nógva konstruktiva viðgerð, vit eru bara ikki komin á mál enn, sigur Bjarni Djurholm.

Nú er Høgni Joensen sagdur upp

UPPSØGN
Áki Bertholdsen

Høgni Joensen er nú uppsagdur sum aðalstjóri á Almanna- og heilsumálastýrinum og han er farin til hús

– Hann hevur ikki teir persónligu eginleikarnir, sum skulu til fyri at vera aðalstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum

Nú er Høgni Joensen sagdur úr starvið sum aðalstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum.

Tað hendi mikudagin, tá ið hann fekk uppsagnarbræv, sum Anfinn Kallsberg, løgmaður, Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum og Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, hava skrivað undir.

Í uppsøgnini hava tey ikki nakra ítøkiliga grund til at siga siga Høgna Joensen úr starvinum. Men tey siga, at tey halda ikki, at hann hevur teir neyðugu, persónligu eginleikarnir at vera aðalstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum. Tey vísa á, at stýrið virkar ikki nógv væl og at tað er hann, sum hevur formligu ábyrgdina av tí.

Uppsagnartíðin er tríggjar mánaðir frá 1. apríl at rokna, men hann er longu farin úr starvinum, tvs, at hann skal ikki vera til arbeiðis í uppsagnartíðini.

Høgni Joensen hevur nú fingið 14 dagar til at gera viðmerkingar til uppsøgnina.

Sámal Petur í Grund hevur áður upplýst, at Maria á Dul varð settur aðalstjóri fyribils, til starvið er lýst leyst og nýggjur er settur.

Sjálvur hevur Høgni Joensen ongar viðmerkingar í løtuni.

NOA®
NOA
Nógv nýtt heimkomið til páskar

29
Í Tróndargøtu
tel. 318200